# Stuttleikaútgerð.

*Tilvildarlig mynd: Karl Joensen*



**Stuttleikaútgerð hevur verið til umrøðu í fjølmiðlum av ymiskum orsøkum.**
**Ofta hevur talan verið um stuttleikaútgerð í øðrum londum enn í Føroyum, men eisini stuttleikaútgerð í Føroyum hevur verið til umrøðu í seinastuni.**
**Ofta er umrøðan orsakað av óhappum, sum hava verið orsøk til skaðar av ymiskum slag, harundir fólkaskaða.**

**Tá eru spurningarnir ofta:**

1. **Hvussu er við trygdini?**
2. **Hvør hevur eftirlit við útgerðini?**
3. **Hvørjar reglur eru galdandi?**

Spurningarnir eiga at kunna svarast, og her er eitt boð uppá hvussu svarast kann uppá omanfyri nevndu spurningar.

**1. Hvussu er við trygdini?**
Trygdin er so góð sum fyrireikarin/eigarin av útgerðini ger hana.

**2. Hvør hevur eftirlit við útgerðini?**
Í Føroyum hevur eingin myndugleiki e.o. fingið til uppgávu, at góðkenna nakran persón, virki e.a. til at hava eftirlit við stuttleikaútgerð.
Heldur ikki er ásett í nakrari lóg e. ø. reglum, hvørji krøv eru til útgerðina, og tí er trupult at siga um útgerðin er lóglig ella ikki og harvið um útgerðin er nóg trygg ella ikki.

Í Danmark er tað Justitsministeriet, sum ger reglur fyri stuttleikaútgerð, meðan politiið gevur loyvi til at seta stuttleikaútgerðina upp. Fyri at fáa hetta loyvi frá politinum skal tann, ið søkir, skjalprógva, at hann hevur góðkenda ábyrgdartrygging og kvittan, sum vísir at goldið er.
Hartil skal hann vísa innsiglaða eftirlitsbók, ið vísir, at útgerðin er undir regluligum eftirlitið av góðkendum virki.
Góðkent virkið er eitt virkið, ið er "akkrediterað" av DANAK, til at hava eftirlit við ávísari stuttleikaútgerð.



*Tilvildarlig mynd: Karl Joensen*

**3. Hvørjar reglur eru galdandi?**
Í Føroyum eru ongar reglur galdandi, ið beinleiðis snúgva seg um stuttleikaútgerð.

Hvørki lóg, kunngerð, ella aðrar reglur. Hinvegin er revsilógin altíð galdandi, og kann hon í ávísan mun brúkast, um nakar við vilja ella av grovum ósketni setir lív ella heilsu hjá øðrum í vanda.

Í Danmark er tað, sum omanfyri nevnt, Justitsministeriet, ið ger reglur fyri stuttleikaútgerð.
Í løtuni er ein kunngerð á økinum, ið eitur:

- *Bekendtgørelse om offentlige forlystelser nr 502 af 17/06/2005,* sum er broytt við
- *Bekendtgørelse om ændring af bekendtgørelse om offentlige forlystelser* nr. 1326 af 14/12/2005

Meðan tað er Justitsministeriet, ið ger reglurnar, er tað, sum omanfyri nevnt, politiið, ið gevur loyvi til at seta stuttleikaútgerð upp, eftir umsøkn.

Fyri at fáa loyvi frá politinum krevst at viðkomandi lýkur ávísar treytir, og eru treytirnar í stuttum:

1. Lógarkravd trygging av hjálparfólki.
2. Ábyrgdar trygging fyri materiellan skaða, áljóðandi 2 mil. kr. og 5 mil. kr. fyri fólkaskaða
3. Kvittan fyri gjald av omanfyri nevndu tryggingum.
4. Innsiglað eftirlitsbók við staðfestum eftirlitið.

Eftirlitið, sambært pkt. 4 omanfyri, skal vera gjørt av einum av DANAK "akkrediteraðum" virkið, og eru nøkur av hesum:

- Teknologisk Institut,
- Force og
- Eurofins.



*Tilvildarlig mynd: Karl Joensen*

Hesi virkið gera so eitt objektivt eftirlit av stuttleikaútgerðini, áðrenn hon verður sett upp, og sum ófráboðað eftirlit, meðan útgerðin er í nýtslu, eftir ávísum normum og standardum, alt eftir hvat slag av stuttleikaútgerð talan er um.



*Tilvildarlig mynd: Karl Joensen*

Standardarnir fáast frá DS (Dansk Standard).

Sí eisini grein í Trygd & trivni nr. 2006/2, síða 12, "Stuttligt", um spælipláss.

*August 2008*

*Karl Joensen*
*Arbeiðseftirlitið*